## Jólagáva til B36

Tollaksmessudag kundi B36 á heimasíðu sínari staðfesta, at felagið hevur gjørt avtalu við Dmitrij Jankovic, sum soleiðis verður partur av Vodafone-hópinum hjá felagnum. Dmitrij var ein týðandi partur av liðnum hjá B36 í 2008, men í fjør hevur hann spælt fótbólt í Serbia. Við hesum hevur B36 fingið fatur í einum sterkum verjuskipara, og tí er ikki løgið, at fjepparar hjá árstalsfelagnum fegnaðust um jólagávuna, hóast hendan kom ein dag ov tíðliga.




## Nykänen aftur handtikin

Í 80'unum var Matti Nykänen kanska størsta stjørnan av øllum í finnlandi. Frá 1982 til 1989 vann hann seks HM-heiti og hópin av World Cup-kappingum í skíðlopi, men síðani hevur lagnan ikki verið serliga blíð. Fleiri ferðir er hann dømdur fyri harðskap móti konu síni, og nú er hann ákærdur fyri morðroynd móti unnustu síni. Nykänen hevur seinnu árini havt stórar rúsdrekkatrupulleikar, og tvær ferðir hevur hann sitið í fongsli.

# Eingin kollvelting

**Tað var millum menninar hjá Kyndli og VÍF, at spenningurin skuldi finnast. Í hinum hálvfinalunum stóð samlaða úrslitið ikki til at broyta**




Jákup Mørk



Kvinnurnar hjá Stjørnuni eru stórfavorittar undan kvinnufinaluni, har tær skulu spæla móti VÍF

Stjørnan og VÍF hjá kvinnum og Neistin hjá monnum. Tað eru tey trý liðini, sum saman við mansliðnum hjá Kyndli standa fyri undirhaldinum, tá finaludagurin í hondbólti verður á skránni í februar mánaði.

Menninir hjá Neistanum høvdu í sínum lagi vunnið við 12 málum á H71 í fyrru uppgerðini, og tí var tað so sum so við intensitetinum í seinnu hálvfinaluni. Her var Neistin eisini á odda stóran part av dystinum, men tað eydnaðist H71 at toga ein tepran sigur til høldar. Men tað í sjálvum sær broytti ikki upp á samlaða roknistykkið.

Tað gjørdist tað heldur ikk hjá Kyndilskvinnum, sum vunnu sína seinnu hálvifnalu móti VÍF við 25-22. Her hevði VÍF vunnið stórt í fyrru uppgerðini, og tí kundu tær taka tapið hampuliga róligt.

Og endaliga staðfesti Stjørnan sítt finalupláss, tá tær vunnu tepurt á Tjaldri í seinnu hálvfinaluni teirra millum. Stjørnan vann stórsigur í Runavík undan jólum, og tí var talan at kalla um avgreiðsluspurning, hóast talan samstundis var um dyst millum tey bæði fremstu kvinnuliðini í landinum.

### Fakta um hálvfinalurnar

**Kvinnur**
Kyndil-VÍF 25-22 (11-12)
(VÍF víðari við samanlagt 53-46)
Stjørnan-Tjaldur 30-29
(Stjørnan víðari við samanlagt 61-49)

**Menn**
Kyndil-VÍF 26-27 (13-10)
(Kyndil víðari við samanlagt 52-49)
H71-Neistin 33-31 (15-16)
(Neistin víðari við samanlagt 71-61)

# Allan hugsar enn um fótbóltin

**Kemur rætta tilboðið undir røttu umstøðunum, verður Allan Simonsen kanska aftur at síggja sum fótbóltsvenjari.**




Jákup Mørk

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin er ein av bestu fótbóltsspælarunum, sum Danmark nakran tíð hevur fostrað. Men sum venjari vann hann sær ongan tíð nakra stóra yrkisleið. Hann fekk sekkin í Vejle, hevði átta góð ár í Føroyum, og í Luxemburg fekk hann eisini sekkin.

Hetta var í 2004, og síðani hevur nú 57 ára gamli Allan Simonsen búð uttan fyri Barcelona, har hann hevur tikist við ymiskt, sum als ikki hevur við fótbólt at gera.

Men í samrøðu við BT sigur Allan Simnosen, at hann als ikki hevur útilokað fótbóltin úr lívi sínum.

- Trupulleikin í dag er, at fótbólturin er vorðin eitt sirkus. Menn við nógvum pengum halda, at úrslitini koma, bara tú gevur nóg nógvar pengar. Og koma hesi ikki alt fyri eitt, fær venjarin sekkin.

- Um eg fekk tað rætta tilboðið undir røttu fortreytunum, har eg kundi fingið trý ella kanska fimm ár til at byggja eitt lið upp, so vildi eg fegin vent aftur til fótbóltin, sigur Allan Simonsen millum annað í viðtalinum við BT.



## Wozniacki best í Danmark

Størsta ítróttarnavnið í Danmark í 2009 gjørdist Caroline Wozniacki. BT hevur staðið fyri eini atkvøðugreiðslu, og har vann Wozniacki 539 av 540 møguligum stigum. Nummar tvey á listanum gjørdist Lotte Friis, sum í heyst vann sær støðu sum ein av heimsins bestu langteinarum hjá kvinnum. Nicklas Bendtner gjørdist nummar trý.

## Bendtner tjenar mest

Nicklas Bendtner var í fjør best lønta ítróttarnavnið hjá Danmark. BT skrivar, at Bendtner hevur eina ársinntøku upp á 27,5 milliónir krónur. – Sjálvandi er tað deiligt at hava nógvar pengar. Tað gevur jú eitt ávíst frælsi. Men upphæddirnar í sjálvum sær eru einki mál hjá mær. Tá hava tey, sum standa mær nær, nógv størri týdning, sigur Bendtner við BT. Næst á listanum vóru Christian Poulsen og Caroline Wozniacki.

## Zlatan veddar við venjarar

Svenski Zlatan Ibrahimovic sigst hava tikið av, tá venjari hansara spurdi hann, um hann hevði hug at vedda. Avbjóðingin hjá Zlatan verður at skora 40 mál ella meira hetta kappingarárið. Higar til hevur Zlatan skotið 12 mál, so 38 afturat skulu í meskarnar, tað sum eftir er av kappingarárinum, um hann skal vinna hendan dystin móti Joesp Guardiola. Tað verður ikki sagt, hvat stendur upp á spæl, men er vinningurin ov stórur, kann Guardiola jú altíð seta Zlatan á beinkin nakrar dystir.

## Anja vil venja menn

Anja Andersen hevur vunnið tað, sum vinnast kann innan kvinnuhondbólt. Bæði sum spælari og venjari. Nú hevur helst fremsta hondbóltsfrúgvin í danskari søgu sett sær nýggj mál. – Eg vil fegin venja eitt manslið, og eisini har vinna Champions League við einum donskum felag. Tað skuldi verið møguligt, um tað er eitt felag við fíggjarligari styrki, soleiðis at tað ber til at heinta tveir-tríggjar útlendskar profilar, sigur Anja Andersen við BT.